DÓMARASKRIVSTOVAN

# Skrivstovuleiðari

## (administrativ kontorleder)

Starv sum skrivstovuleiðari á Dómaraskrivstovuni er leyst at søkja til setan 1. september 2007.

Starvið er fulltíðarstarv.

**Høvuðsuppgávur:**
- Starvsfólkafyrisiting
- Umsiting
- Kunning
- Samskifti

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- Góð evni at samskifta
- Áhuga og førleika innan starvsfólkaleiðslu
- Góð samstarvsevni

**Setanar- og lønartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/Stat og Finansministeriet. Viðkomandi, sum sett/ur verður, verður lønt/ur sum deildarleiðari I á skalatrin 39 við eini byrjunarløn uppá 26.650 kr. Haraftrat kemur eitt føroyatillegg uppá 2.202 kr. um mánaðin.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur útbúgving og royndir innan leiðslu. Møguleiki verður at luttaka á skeiðum, sum verða fyriskipað av Domstolsstyrelsen.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú venda tær til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, á telefon 31 10 03 innan 12. juli 2007 ella Hendrik Møller, adm. sorinskrivara aftaná 22. juli 2007 og fáa útflýggjað vegleiðandi starvslýsing viðvíkjandi starvsuppgávum hjá einum skrivstovuleiðara.

**Umsóknir:**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu sendast til

Dómaraskrivstovuna
Postboks 28
FO-110 Tórshavn

ella sum teldupostur til post@sorinskrivarin.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. august 2007 kl. 12.00.

**SORINSKRIVARIN Í FØROYUM**
tann 4. juli 2007

# Bátur til sølu

Um hóskandi boð fæst, er trolbáturin/línubáturin MS Niclas til sølu, við øllum loyvum.

**Áhugað kunnu ringja 220007.**



## Pedagogar [endurlýsing]

Býlingshúsið Norðasta Horn søkir eftir trimum pedagogum at arbeiða 30-40 tímar um vikuna. Størvini eru í barnagarðsstovu og verða sett 6 august ella eftir nærri avtalu. Eisini søkja vit eftir einum pedagogi í farloyvisstarv 30 tímar um vikuna í vøggustovu frá 1 august til 31.oktober 2007. Hjálparfólk eru eisini vælkomin at søkja størvini.

**Stovnurin**
Í býlingshúsinum hava vit eina vøggustovu við 12 børnum tvær barnagarðsstovur, við ávikavíst 17 og 19 børnum.

Stovnurin er júst umbygdur, soleiðis at hølisumstøðurnar eru sera góðar. Afturat verandi rúmum hava vit fingið nýtt starvsfólkarúm, verkstøð og samtalurúm. Garðurin er stórur og avbjóðandi. Har hava vit eisini eitt verkstað til leir, timbur, o.t.
Somuleiðis hava vit frálíkan fótbóltsvøll.

Stutt er út í hagan og ánna. Fram við Sandá/Tvørá hava vit trý vælútgjørd pláss við smáttum og bálplássum, har bert hugflogið setur markið.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Okkara mál**
Vit vilja geva børnunum ein mennandi og spennandi gerandisdag, har dentur verður lagdur á at menna sjálvsálitið, sjálvsvirðingina, hugflog, kreativitet, sosialar førleikar og kunna tey um okkara søgu og mentunarvirðir.

**Vit søkja eftir fólki sum vil:**
- geva børnunum ein spennandi dag við avbjóðingum í mennandi umstøðum.
- vera við at skapa umstøður, har børn, foreldur og starvsfólk trívast.
- luttaka og mynda arbeiðið á stovuni/stovninum.
- vera ein positiv og góð fyrimynd fyri børnini.

**Meira fæst at vita**
við at ringja til tlf. 210906 og tosa við Óla.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum Norðasta Horn, Granagøta 5, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 21. juli 2007.

**Tórshavnar kommuna**



## Verkstaðsfólk

Av tí at okkara dugnaliga verkstaðsfólk hevur valt at taka við nýggjum avbjóðingum, verður søkt eftir verkstaðsfólki til nýmótans verkstað kommununnar.

Á verkstaðnum, ið er knýtt at sløkkiliðsstøðini, starvast í løtuni seks fólk, ið hava ábyrgd av øllum maskinum og akførum hjá kommununi. Talan er um umleið 100 rullandi eindir.

**Vit bjóða**
Eitt starv við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvðusuppgávunum hjá verkstaðsmanninum verða m.a.
- umvæling av maskinum, bilum, tólum o. t.
- annars vanligt verkstaðsarbeiði

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at viðkomandi hevur útbúgving sum bil/lastbilmekanikari, maskinsmiður e.l.

Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar yvir 3500 kg., er handaligur, hevur prógv innan onkra av nevndu útbúgvingum og hevur fyrstahjálparprógv.

Nevnda koyrikort og fyrstahjálp kann takast innan seks mðr. eftir setan.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er mánaðarlønt eftir sáttmála millum Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið, og verður sett skjótast til ber.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Gullak Poulsen, virkandi verkstaðsleiðara, ella Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, á tlf. 302100.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Snarskivuni, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 23. juli 2007 kl 12.00. Merk umsóknina "Verkstaðsfólk".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**